Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 21.11.2013 kl. 17:30
Málnr.: 13/00245

Nevndarlimir:: Jógvan Skorheim, Steinbjørn O. Jacobsen, Gunvá við Keldu, Óluva Klettskarð, Jóhann Lützen, Kristian Eli Zachariasen, Signhild V. Johannesen, Eyðstein Ó. Poulsen, Elsebeth Mercedis Gunnleygdóttur, Atli S. Justinussen og Herfrí J. Sørensen.

Onnur: Tummas T. Eliasen, kommunustjóri
Nevndarskrivari: Jensa Anthoniussen, protokollførari

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
49/13	13/00844	Fíggjarætlan 2014
50/13	13/00841	Nevndir, broyting í kommunustýrisskipan Klaksvíkar kommunu (okt. 2013) - flyting av umsitingarøkjum frá TN til BBN + møgulig broyting av nevndarheitinum BBN - *seinna viðgerð*
51/13	11/00134	Grunnurin Mentanarhúsið í Klaksvík - góðkenning av broyting í samtyktum fyri grunnin (okt. 2013)
52/13	12/00621	Nýtt Blákrossheim - tilmæli um útgjalding í 2013 - *flyting millum høvuðskontubólkar, fyrra viðgerð*
53/13	10/00400	Sundurbýti av matr.nr. 87a í Svínoy
54/13	13/00993	Heimild til matrikulering av miðbýarøkinum
55/13	13/01002	Broyting av fíggjarætlan 2013, Spillivatnsætlanin - *eykajáttan, fyrra viðgerð*
56/13	13/01003	Broyting av figgjarætlan 2013, BBN - *flyting millum høvuðskontubólkar, fyrra viðgerð*
57/13	13/00349	Skipan av serstovu innan dagstovnaøkið - *flyting millum høvuðskontubólkar, seinna viðgerð*

Nólsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík
Tlf. 410000 Fax 410001

Undirskrift formansins: _____

49/13
13/00844 Fíggjarætlan 2014

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Byggi- og Býarskipanarnevndin	05.11.2013	13/13	
2 Mentanarnevndin	05.11.2013	36/13	
3 Trivnaðarnevndin B&U	05.11.2013	7/13	
4 Havna- og Vinnunevndin	05.11.2013	17/13	
5 Trivnaðarnevndin E&B	05.11.2013	6/13	
6 Tekniska Nevnd	05.11.2013	48/13	
7 Fíggjarnevndin	05.11.2013	66/13	
8 Klaksvíkar Býráð	21.11.2013	49/13	

Frágreiðing um málið:
Á temafundi 5. nov. 2013 samtyktu BBN, MeN, TrN B&U, HaVN, TrN E&B, TN og FíN at taka undir við einum uppskoti til fíggjarætlan fyri 2014, dagfest 5. nov. 2013, sum við einum skattaprosenti á 21,5% og einum barnafrádrátti á kr. 4.500,- sum javnvingar við niðanfyri standandi høvuðstølum:

Inntøkur		kr. 163.500.000
Rakstur:		
1: Kommunal fyrisiting	kr. 16.579.000	
2: Almanna- og heilsumál	kr. 15.313.000	
3: Børn og ung	kr. 29.532.000	
4: Útbúgving og gransking	kr. 8.997.000	
5: Mentan og frítíð	kr. 9.881.000	
6: Teknisk mál	kr. 17.142.000	
7: Kommunal virki	kr. 9.316.000	
Rakstur		kr. 106.760.000
		kr. 56.740.000
Rentustuðul	kr. 5.500.000	
Fíggjarútreiðslur netto	kr. 7.000.000	
Rakstrarúrslit		kr. 44.240.000
Íløgur tilsamans		kr. 36.700.000
RLÚ-úrslit		**kr. 7.540.000**
Avdráttir:		
Lánsgjøld	kr. 22.578.000	
Umfígging	kr. 15.038.000	
Avdráttir		**kr. 7.540.000**
Úrslit		**kr. 0**

Íløgur:			
2: Almanna- og heilsumál			0
3: Børn og ung			0
4: Útbúgving og gransking	Sk. á Ziskatr./Ósask. (liðugt)	kr. 9.000.000	
5: Mentan og frítíð	Bláa Skýlið	kr. 1.200.000	
	Badminton-/KÍ-høllin	kr. 1.000.000	
	Rennibreyt	kr. 1.000.000	
	Svimjihøllin (íløga)	kr. 4.000.000	
6: Teknisk mál	Fastognir (íløga)	kr. 1.400.000	
	Kirkjugarðar	kr. 1.000.000	
	Kloakkir (íløga)	kr. 9.500.000	
	Vegir (íløga)	kr. 4.800.000	
	Byggibún. ídn.øk., miðbý.	kr. 1.000.000	
7: Kommunalt virki	Havnin (íløga)	kr. 2.800.000	
Íløgur tilsamans			kr. 36.700.000

Tilmæli:
Í sambandi við fyrru viðgerð av fíggjarætlanini var ikki atkvøtt serskilt fyri broytingunum, sum Kommunustýrislógin leggur upp til. Fyri at rætta hetta mistak, skal býráðið fyrst atkvøða um broytingarnar, ið vórðu viðtiknar av TrN B&U 22. okt. og TN 23. okt. 2013.

TrN B&U 22-10-2013 - ***13/00946 Fíggjarætlan 2014, Trivnaðarnevndin Børn & Ung*****:** Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagfest 17-10-2013. Í sambandi við játtanina til Ung í Arbeiði heitir nevndin á hinar býráðsnevndirnar um at veita eina játtan í part til øking av hesari játtan, so hon verður í samsvari við tilmælið í málinum um Ung í Arbeiði (j. nr. 13/00376).

TN 23-10-2013 - ***13/00941 Fíggjarætlan 2014, Tekniska Nevnd*****:** Ein meiriluti í nevndini, Steinbjørn O. Jacobsen, Kristian Eli Zachariasen, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur og Jóhann Lützen taka undir við fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan fyri 2013.
Ein minniluti, Gunvá við Keldu mælir frá, at 500 t.kr. verða tiknar frá Klaksvíkar Havn. Sambært hesum verður avsetingin til bussleiðina 1,2 mió. kr

BBN, **MeN**, **TrN B&U**, **HaVN**, **TrN E&B**, **TN** og **FíN 05-11-2013**: Málið verður við hesum sent býráðnum til endaliga samtykt av fíggjarætlan býráðsins fyri 2014.

Býráðsins samtykt 21-11-2013:
Samtykt

50/13
13/00841 Nevndir, broyting í kommunustýrisskipan Klaksvíkar kommunu (okt. 2013) - Flyting av umsitingarøkjum frá TN til BBN og Broyting av nevndarheitinum BBN - *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Klaksvíkar Býráð	21.11.2013	50/13	

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð samtykt av býráðnum 31. okt. 2013.

Tilmæli:
Mælt verður býráðnum til at samtykkja málið við seinnu viðgerð.

Býráðsins samtykt 21-11-2013:
Samtykt.

51/13
11/00134 Grunnurin Mentanarhúsið í Klaksvík - góðkenning av broyting í samtyktum fyri grunnin (okt. 2013)

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Klaksvíkar Býráð	21.11.2013	51/13	

Frágreiðing um málið:
Grunnurin Mentanarhúsið í Klaksvík hevur havt fund 19. nov. 2013, har uppskot til broytingar í samtyktum grunsins varð viðgjørt og samtykt.

Broytingar:

Viðv. umsiting/skrivarauppgávum:

"**Umsiting/Skrivarauppgávur** - Stjórnarskrivstova Klaksvíkar Kommunu hevur ábyrgd av tí umsitingarliga arbeiðinum, sum er tengt at stýrinum fyri Grunnin Mentanarhúsið í Klaksvík"

Viðv. føstum fundum:

"Stýrið hevur fund, so ofta verður hildið neyðugt, *tó í minsta lagi 6 ferðir um árið*, til at taka sær av ...

Viðv. grannskoðara:

orðingin *ríkisgóðkendum* grannskoðara broytast til *góðkendum*

Lógargrundarlag:
Sambært grein 11 í samtyktum grunsins, skulu samtyktarbroytingar góðkennast av Klaksvíkar Býráð.

Fíggjarligar avleiðingar:
-

Tilmæli:
Mælt veður til at góðkenna broyttu samtyktir grunsins.

Býráðsins samtykt 21-11-2013:
Samtykt

52/13
12/00621 Nýtt Blákrossheim - tilmæli um útgjalding í 2013 - *flyting millum høvuðskontubólkar, fyrra viðgerð*

Nólsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík
Tlf. 410000 Fax 410001

Undirskrift formansins: _____

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung"	12.11.2013	8/13	
2 Trivnaðarnevndin "Eldri & Bústaðir"	12.11.2013	10/13	
3 Fíggjarnevndin	19.11.2013	70/13	
4 Klaksvíkar Býráð	21.11.2013	52/13	

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá Trivnaðardeildini, dagfest 7. nov. 2013, har m.a. verður víst til áður gjørdar samtyktir í nevndum og býráði, sum hevur givið eina tilsøgn um stuðul til Bláa Kross, áljóðandi kr. 400.000,-, ið sambært samtyktini skal rindast felagsskapinum, tá ið nýggja heimið er liðugt bygt og verður tikið í nýtslu.

Borgarstjórin hevur heitt á umsitingina um at leggja málið fyri avvarðandi nevndir og býráðið við tilmæli um, at stuðulin, sum kommunan hevur givið tilsøgn um, verður útgoldin í inniverandi fíggjarári, ístaðin fyri at bíða til bygningurin verður tikin í brúk komandi summar.

Um málið fær politiska undirtøku, verður neyðugt við flyting av játtan millum høvuðskontubólkar, sum krevur tvær býráðssamtyktir í sama fíggjarári, sum í hesum føri ætlast at verða í november (fyrra viðgerð) og desember (seinna viðgerð) í 2013.

Lógargrundarlag:
Stuðulin er játtaður við støði í, at Blái Krossur veitir eitt almannagagnligt tilboð, sum fevnir um allar borgarar í landinum, herundir Klaksvíkar Kommunu – og játtaði stuðulin verður veittur vegna hesar borgarar.

Fíggjarligar avleiðingar:
Í inniverandi fíggjarætlan er eingin játtan sett av til játtaða stuðulin, og tí verður neyðugt við flyting millum kontur, í hesum føri frá høvuðskontubólki 3, ”*Barnaansing Felags*”, konta nr. 559000 ”*Óvanligar flytingar annars*”, til kontubólk 2, ”*Ymiskur Stuðul Almanna og Heilsu*”, konta nr. 549000 ”*Annar stuðul o.a*.”.

Hetta merkir eina minni tøka upphædd til nýtslu innan barnaansing felags í inniverandi fíggjarári.

Tilmæli:
Vísandi til omanfyristandandi, verður mælt til, at játtaði stuðulin til Bláa Kross Føroyar, kr. 400.000,- verður útgoldin og stuðulin útreiðsluførdur í inniverandi fíggjarári, og at henda útgjalding verður fíggjað við flyting av neyðugu játtanini frá høvuðskontubólki 3, ”*Barnaansing Felags*”, konta nr. 559000 ”*Óvanligar flytingar annars*”, til høvuðskontubólk 2, ”*Ymiskur Stuðul Almanna og Heilsu*”, konta nr. 549000 ”*Annar stuðul o.a*.”.

TrN B&U 12-11-2013: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 07.11.13.

TrN E&B 12-11-2013: Ásannandi at verkætlanin líður so væl og fer til verka í komandi ári, og at rúm er fyri hesum í fíggjarætlanini í 2013, tekur nevndin undir við tilmælinum dagfest 07-11-2013.

FíN 19-11-2013: Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Óluva Klettskarð og Eyðstein Ó. Poulsen, tekur undir við TrN B&U og TrN E&B 12-11-2013 og leggur dent á, at hetta málið ikki hevur ein prejudicerandi virknað.
Ein minniluti, Atli S. Justinussen, heldur fast við, at verkætlanin eigur at stuðlast, og at peningurin verður útgoldin, tá bygningurin er tikin í nýtslu, vísandi til aðrar byggiætlanir, ið kommunan áður hevur stuðlað.

Býráðsins samtykt 21-11-2013:
Samtykt at útreiðsluføra upphæddina - kr. 400.000 - í 2013, men at peningurin verður útgoldin, tá verkætlanin stendur liðug.

53/13
10/00400 Sundurbýti av matr. nr. 87a í Svínoy

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Byggi- og Býarskipanarnevndin	11.11.2013	18/13	
2 Klaksvíkar Býráð	21.11.2013	53/13	
3 Svínoyarnevndin			

Frágreiðing um málið:
Umhvørvisstovan biður um býráðsins viðmæli til, at sethús, fjós og seyðahús verða frábýtt festijørðini – matr. nr. 87a í Svínoy.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti.

Fíggjarligar avleiðingar:
-

Tilmæli:
Tekniska umsiting mælir til at viðmæla umsóknini.

BBN 11-11-2013: Nevndin tekur undir við tilmælinum dagf. 05-11-2013.

Býráðsins samtykt 21-11-2013:
Samtykt

54/13
13/00993 Heimild til matrikulering av miðbýarøkinum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Byggi- og Býarskipanarnevndin	11.11.2013	14/13	
2 Havna- og Vinnunevndin	12.11.2013	K-9/13	
3 Tekniska Nevnd	13.11.2013	K-24/13	
4 Fíggjarnevndin	19.11.2013	73/13	

5 Klaksvíkar Býráð	21.11.2013	54/13	

Frágreiðing um málið:
Í samband við ætlaðu byggingina í miðbýarøkinum verður neyðugt at matrikulera økið sum skjótast.. Sum treyt fyri, at økið kann matrikulerast, er, at Serstaka Byggisamtyktin er góðkend. Í skrivandi løtu bíða vit framvegis eftir endaliga stemplinum frá Fiskimálaráðnum (fyrr Innlendismálaráðnum).

Lógargrundarlag:
-

Fíggjarligar avleiðingar:
Sambært kunngerð nr. 14 frá 11. februar 2009 um gjøld eftir matrikullógini verður kostnaðurin fyri matrikulering mettur til:

Grundgjald	kr. 4.000,-	
Tal av lutum: 16 á kr. 3.000,-	kr. 48.000,-	
2% av marknaðarvirðinum	kr. 600.000,-	(uml. 20.000 m2 x kr. 1.500,- = 30 mill.)
tilsamans	kr. 652.000,-	

sum verður bókað av *Byggi- og Býarplansútreiðslur*

Tilmæli:
Á hjálagda skjali I er víst vegleiðandi uppskot til prinsipiella matrikulering av miðbýarøkinum. Tekniska Umsiting biður við hesum um býráðsins heimild til at arbeiða víðari við at fastleggja smálutirnar í fyriliggjandi uppskoti fyri síðani at avgreiða málið víðari til Umhvørvisstovuna, tá Serstaka Byggisamtyktin er góðkend.

BBN 11-11-2013: Nevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku umsiting, dagf. 05-11-2013.

HaVN 12-11-2013: Málið verið til kunning.

TN 13-11-2013: Málið verið til kunning.

FíN 19-11-2013: Nevndin tekur undir við BBN 11-11-2013.

Býráðsins samtykt 21-11-2013:
Samtykt

55/13
13/01002 Broyting av fíggjarætlan 2013, Spillivatnsætlanin - *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Byggi- og Býarskipanarnevndin	11.11.2013	15/13	
2 Fíggjarnevndin	19.11.2013	74/13	
3 Klaksvíkar Býráð	21.11.2013	55/13	

Frágreiðing um málið:
Tann 23. mai 2013 vórðu kr. 700.000 fluttar frá Spillivatnsætlanini til Barnaverndartænastuna. Ætlanin hevur verið, at hesin peningur skuldi berast aftur í eini møguligari regulering í sept. 2013.

Vísst verður til niðanfyri standandi viðtøkur.

> ***SoN 14-05-2013:*** *Vísandi til fyrru Býráðssamtyktina, 21. mars 2013, mælir nevndin býráðnum til at samtykkja málið seinnu ferð, og at málið verður fíggjað við flyting millum kontur á kr. 700 tús. frá játtanini til spillivatnsætlanina, og at ein øking á kr. 700 tús. til spillivatnsætlanina verður tikin upp aftur í sambandi við endurskoðan av fíggjarætlanini 2013 í september.*
>
> ***FíN 21-05-2013:*** *Nevndin tekur undir við SoN 14-05-2013.*
>
> ***Býráðsins samtykt 23-05-2013:***
> *Tilmælið samtykt.*

Lógargrundarlag:
-

Fíggjarligar avleiðingar:
Málið viðførir, at íløgukarmurin fyri 2013 hækkar við kr. 700.000, og skal málið tí hava tvær viðgerðir í Býráðnum.

Tilmæli:
Mælt verður til, at kr. 700.000 verða tiknar av *Tøkum peningi*.

BBN 11-11-2013: Nevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku umsiting dagf. 07-11-2013.

FíN 19-11-2013: Nevndin tekur undir við BBN 11-11-2013.

Býráðsins samtykt 21-11-2013:
Samtykt

56/13
13/01003 Broyting av figgjarætlan 2013, BBN - *flyting millum kontur, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Byggi- og Býarskipanarnevndin	11.11.2013	16/13	
2 Fíggjarnevndin	19.11.2013	75/13	
3 Klaksvíkar Býráð	21.11.2013	56/13	

Frágreiðing um málið:
Fyrr í ár var semja í Heilsu- og Umhvørvisnevndini um at skipa fyri tiltakinum "Heilsuvikan 2013". Tiltakið varð mett at kosta einar 100.000 kr., og skuldi kommunan bera umleið 70.000 kr. av hesum útreiðslum.

Formaðurin í táverandi HeiUN og BBN hevur heitt á umsitingina um at leggja eitt mál fyri viðkomandi nevndir og býráð, har kr. 70.000 verða fluttar frá konto *Byggi- og Býarplansútreiðslur* til konto *Umhvørvistiltøk.*

Lógargrundarlag:

-

Fíggjarligar avleiðingar:
Talan er um útreiðsluneutrala eykajáttan, har peningur verður fluttur millum høvuðskontur, og skal málið tí samtykkjast tvær ferðir.

Tilmæli:
Tekniska Umsiting mælir nevndum og býráðið til at samtykkja málið.

BBN 11-11-2013: Nevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku umsiting dagf. 07-11-2013.

FíN 19-11-2013: Nevndin tekur undir við málinum í sambandi við kunningina, ið var á fundinum hjá HeiUN 17-04-2013.

Býráðsins samtykt 21-11-2013:
Samtykt

57/13
13/00349 Skipan av serstovu innan dagstovnaøkið - *flyting millum høvuðskontubólkar, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung"	22.10.2013	4/13	
2 Fíggjarnevndin	29.10.2013	59/13	
3 Klaksvíkar Býráð	31.10.2013	42/13	
4 Klaksvíkar Býráð	21.11.2013	57/13	

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð samtykt av býráðnum 31. okt. 2013.

Tilmæli:
Mælt verður býráðnum til at samtykkja málið við seinnu viðgerð.

Býráðsins samtykt 21-11-2013:
Samtykt

OMANFYRISTANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI